Starvslýsing

Heimatænastan

## Heilsuhjálpari til Heimatænastuna í Norðoyggjum

Eitt starv sum heilsuhjálpari er leyst at søkja vegna barnsburðarfarloyvi. Starvið er 25 tímar um vikuna, og er tíðaravmarkað frá 01.04.2010 til og við 31.12.2010.

Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Heimatænastuna á telefon 762400 allar yrkadagar.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

Heimatænastan í Norðoyggjum
Klingrugarður 2
FO-700 Klaksvík

**Umsóknarfreist: 26.03.2010**

Les alla lýsingina á heimasíðu okkara
www.naerverk.fo / leys størv

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

---

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.



## Sethús og neyst í Elduvík til sølu

Við hesum verða sethúsini matr.nr. 98 í Elduvík og neystið matr. nr. 101 í Elduvík lýst til sølu.

Sethúsini eru umleið 100 ára gomul, men eru umbygd og umvæld seinastu árini, soleiðis at tey í dag eru sum nýggj. Grundøkið er 243 m² til víddar.

**Húsini eru innrættað soleiðis:**

**Stovuhædd:** Gongd, kamar, køkur og stova. Eisini er ein niðurlækkað stova uml. 24m² til víddar við nýggjum brenniovni.

**Loft:** 3 kømur og toilet. 2 kømur hava kvist.

**Kjallari:** Brúsurúm við hita í gólvinum. Eisini er flettingarkjallari og hjallur við plássi fyri 100 krovum.

Tvey úthús hoyra til húsini.

Neystið er 31 m² til víddar, nýumvælt og flagtak lagt omaná. Í neystinum stendur 4-mannafar, sum eisini er nýumvælt. Báturin verður seldur saman við neystinum.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Advokatskrivstovuna, Christian Andreasen ella Káru á Dunga, tel. 353335

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

---

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.



## Sethús á Eiði

Um hóskandi boð fæst, verður setahúsaognin við hjalli við hesum lýst til sølu.

Talan er um grundøki uml. 357 m² við ástandandi sethúsum og hjalli.

Húsini eru upprunaliga bygd uml. 1916. Grundvíddin er 47 m². Kjallarin óinnrættaður.

**Miðhædd:** Køkur, tvær stovur, gangur og wc.

**Loft:** Trý kømur.

Húsini eru nakað dagførd, men treingja til ávísar ábøtur. Húsini standa mitt í bygdini, og útsýnið er sera gott.

Sethúsaognin er partur av matr. nr. 164 a, Eiði. Ognin er undir sundurbýti í løtuni, og jørðin, sum í dag er partur av samlaðu ognini, fylgir sostatt ikki við í søluni.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fríðu Patursson, advokat, frp@jura.fo ella skrivaran Anniku Reginsdóttir Olsen, aro@jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

---

MENTAMÁLARÁÐIÐ

## Upptøka til journalistútbúgving

Sambært avtalu millum Mentamálaráðið og Danmarks Journalisthøjskole um upptøkuroynd verður soleiðis sagt frá:

Tey, ið ætla sær til upptøkuroynd til útbúgving á Danmarks Journalisthøjskole, fáa upplýsingar um upptøkuroyndina og útbúgvingina á www.djh.dk. Umsóknarblað og prioriteringsskema kann heintast á www.optagelse.dk.

Umsóknarblað og prioriteringskema saman við navnabrævi skulu verða skúlanum, ið umsøkjari hevur sum 1. ynski, í hendi í seinasta lagi 15. mars 2010 kl. 12.

Upptøkuroyndin verður leygardagin 24. apríl 2010. Tey, sum hava søkt um upptøku, fáa frá skúlanum eina skrivliga og neyvari fráboðan um royndina.

Hoyvíksvegur 72 · Postrúm 3279 · FO-110 Tórshavn
Tel. 30 65 00 · Faks 30 65 55 · mmr@mmr.fo

---



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 288233)**

---

## Háskúlaskeið fyri sinnisveik

**14. – 23. apríl 2010**

**Tilmelding á tlf. 764110**



**Føroya Fólkaháskúli**
**Háskúlavegur 14 · 100 Tórshavn**
**Tlf. 311743 · haskulin@haskulin.fo**
**www.haskulin.fo**

---

Sosialurin
www.sosialurin.fo